# Tikið avgerð um hvussu skuldin skal fíggjast

*Næstu tvey árini minkar skuldin hjá Klaksvíkar kommunu niður í eina álíkning*



*Klaksvíkar kommuna verður við í loysnini hjá Landsbankanum, Norðoya Sparikassa og Unibank, nú skuldin hjá kommununi verður umfíggjað*

**Klaksvík:** Nú er greitt, hvussu skuldin hjá Klaksvíkar kommunu skal fíggjast.

Klaksvíkar kommuna skyldar sum er 125 milliónir krónur, og av hesum verða 75 milliónir við í loysnini hjá Landsbankanum, meðan hinar 50 milliónirnar verða fíggjaðar av ymsum peningastovnum.

– Næsta ár skal Klaksvíkar kommuna gjalda stívliga 21 milliónir krónur í rentum og avdráttum, men hendan upphædd minkar niður í góðar 18 milliónir næstu árini, sigur Jógvan við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík.

Síðst í 2002 er skuldin hjá kommuni væntandi komin niður á eina álíkning.

### Betri tilboð

Seinasta hálva árið hevur Klaksvíkar kommuna arbeitt við at umfíggja skuldina hjá sær.

Tá arbeiðið byrjaði vóru tilboðini frá ymiskum peningastovnum hjá kommununi cibor plus eitt til hálvtannað prosent, meðan eitt nú Unibank bjóðaði +2,25%.

Kommunan gjørdi rættiliga skjótt fíggjarstovnum greitt, at alt omanfyri +1% var óáhugavert.

Ein av bankunum, sum kommunan hevði samband við var LB Kiel, sum er ein av størstu bankunum í Europa. Samráðingarnar við hendan peningastovnin eru eitt dømi um, hvussu arbeiðið at betra tilboðini gekk fyri seg.

LB Kiel bjóðaði at fíggja 35 milliónir av skuldini fyri cibor +0,925 umframt eitt kvart prosent afturat. Tá kommunan greiddi ein av stjórunum í bankanum frá, at hetta var ov nógv, og bankin átti at sleppa tí kvarta prosentinum, segði stjórin, at tað mátti hann kanna við tveir aðrar stjórar í bankanum. Eitt korter seinni ringdi stjórin aftur og boðaði, frá at bankin hevði slept tí kvarta prosentinum.

### Valið

Nú býráðið skuldi taka støðu til, hvussu skuldin hjá kommununi skuldi fíggjast, vóru møguleikarnir tvinnir.

Annar var at fara við í loysnina hjá Landsbankanum, Norðoya Sparikassa og Unibank við størra partinum av skudlini, og lata aðrar peningastovnar fíggja minna partin. Hin loysnin, sum millum annað borgarstjórin talaði fyri, var at fíggja alla skuldina á privata marknaðinum.

Endin var, at býráðið samtykti, at loysnin hjá Landsbankanum skuldi brúkast, og tann loysnin var 300.000 krónur bíligari enn hin.

– Eg vardi míni sjónarmið, men býráðið vildi nakað annað, og tá býráðið hevur talað, er bara at gera sum býráðið vil, sigur Jógvan við Keldu, borgarstjóri.

– Hendan loysnin sparir okkum fyri 300.000 krónur, og tað eru eisini pengar, og so er tað eisini ein fyrimunur fyri hesa loysnina, at Norðoya Sparikassi er við í henni, tí í samstarvinum við Unibank kann okkara lokali peningastovnur fáa ekspertisu burturúr, sigur hann.

### Stúrir

Klaksvíkar kommuna hevur fingið eina góða avtalu við Landsbankan. Rentan er cibor +0,75 prosent, og tað er til dømis lægri enn Tórshavnar kommuna, sum hevur +0,9%.

– Tað, sum eg eg eitt sindur ræddur fyri, er, tá eg hugsi um tað fastgjaldavtaluna, sum vit gjørdu við Føroya Banka í 1989. Tá inntøkurnar hjá kommununi frá 1991 til 1993 lækkaðu úr 82 niður í 52 milliónir, fingu vit lítið annað gjørt enn at gjalda lánsgjøld, og tað støðuna vil eg ikki koma aftur í, sigur Jógvan við Keldu.

### Ósatt

Tað hevur verið ført fram, at borgarstjórin í Klaksvík ætlaði at taka avgerðina um fíggingina av skuldini uttan um býráðið, men at býráðslimir kravdu býráðsfund. Hetta avvísir Jógvan við Keldu upp á tað harðasta.

– Tá arbeiðið leið móti endanum, kallaði eg til fund í fíggjarnevndini um málið. Har varð spurt, um fíggjarnevndin bara skuldi taka avgerðina, men tað segði eg nei til. Talan var um týðandi prinsippmál, og tí skuldi tað fyri á býráðsfundi, sum eg sjálvur kallaði inn til, greiðir Jógvan við Keldu frá.

– Tá blaðstjórin á Dimmalætting skrivar, at tað vóru býráðslimir sum kravdu fund, er tað beinleiðis ósatt, sigur hann avgjørdur.

# LV skal avgera um arbeiði skulu bjóðast út

*Landsverkfrøðingurin skal meta um, um arbeiði at gera vegir og tunnlar skulu bjóðast út til privatar at kappast um, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum*

Eyðun Klakstein



*Landsbúskaparliga loysir tað seg verri enn so altíð at gera arbeiðini liðug upp á tilboð, tí at landskassin hevur ikki ráð til tað, og tí at íløgurnar mugu spjaðast kring landið, so eitt øki í landinum ikki verður upphitað, sigur Høgni Hoydal*

Tjóðveldisflokkurin heldur tað ikki verða rætt, at tað skal vera ein meginregla, at arbeiði at gera vegir og tunnlar í Føroyum skal bjóðast út í fríari kapping millum privatar arbeiðstakarar.

– Landsverkfrøðingurin hevur stóra vitan og nógvar royndir, og tí skal tað verða hann, sum í hvørjum einstøkum førði skal meta um, um arbeiði, sum vanliga eru almenn, skulu bjóðast til privatar at kappast um, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum.

Í leygardagsblaðnum avdúkaði Bjarni Djurholm, sum er landsstýrismaður í samferðslumálum, at framyvir skal tað verða meginreglan, at øll nýgerð av vegum í Føroyum skal bjóðast í fríari kapping millum privatar arbeiðstakarar. Harafturat skulu færri verkætlanir verða á skránni í senn, so arbeiðini verða gjørd skjótari og meira effektivt.

– Vit skulu í framtíðini ikki spreiða pengarnar út til eina rúgvu av verkætlanum kring alt landið, so tað ganga ár, áðrenn arbeiðini gerast liðug. Vit skulu hava færri verkætlanir, sum ganga skjótari fyri seg, tí á tann hátt fáa vit sum mest burtur úr pengunum, segði Bjarni Djurholm millum annað við Sosialin leygardagin.

### Eisini LV

Høgni Hoydal eru ikki samdur í hesum. Hann heldur, at Landsverkfrøðingurin skal fáa arbeiðini gjørd á besta og smidligasta hátt, men at tað ikki altíð loysir seg at bjóða arbeiði út til privatar at kappast um.

– Um arbeiðini skulu gerast av privatum, skal tað verða ein meginregla, at arbeiðini skulu bjóðast út, men landsbúskaparliga loysir tað seg verri enn so altíð at gera arbeiðini liðug upp á tilboð. Hetta tí at landskassin hevur ikki ráð til tað, og tí at íløgurnar mugu spjaðast kring landið, so eitt øki í landinum ikki verður upphitað, sigur Høgni Hoydal.

– Landsverkfrøðingurin skal eisini framyvir gera arbeiði, har tað loysir seg betri – til dømis tunnilsboringar, viðlíkahald og smærri verkætlanir. Tað hevur Landsverkfrøðingurin verið noyddur at gera gjøgnum tíðirnar, millum annað tí, at eingin annar var førður fyri tí í Føroyum.

– Tað er neyðugt at hava ein sterkan tekniskan stovn, sum kann savna serfrøði og tryggja, at vitan ikki gleppur okkum av hondum.

### Eingin ideologisk krossferð

Høgni Hoydal heldur, at Landsverkfrøðingurin hevur havt stóran týdning fyri føroyska samfelagið, og at hann skal eisini framyvir hava ein týðandi leiklut í útbyggingini av samferðsluni. Hann skal standa fyri øllum arbeiðum, tí hann hevur neyðugu vitanina og royndirnar, og tað skal hann framhaldandi hava.

– Tað skal ikki verða ein ideologisk krossferð hjá Fólkaflokkinum, at nú skulu privatir arbeiðstakarar gera allar vegir og tunnlar í Føroyum. Slíka meginreglu vilja vit ikki hava, men vit vilja vera við til at tryggja,at almenna uppgávan at at útbyggja samfrðslukervið verður gjørt sum best og bíligast.

Høgni Hoydal sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur virksemi ymsastaðni í landinum, og at tað eisini liggur eitt sosialt fyrilit í hesum. Tað ætlar Tjóðveldisflokkurin ikki at venda sær frá.

– Smærri vegaarbeiði í smábygdum hava verið gjørd soleiðis, at Landsverkfrøðingurin setur fólk á staðnum at gera tey, og tað kann framvegis vera skilagott, heldur Høgni Hoydal.



# Sýna fram ævintýr á palli

*Pedagoknæmingar hava ferðast kring høvuðsstaðin við ævintýrleiki*

Justinus Leivsson Eisedgaard



*Pedagoknæmingar sýna »Den grimme ælling« fram á Verkstaðnum Vón*

**Mynd: Jens Kr. Vang**

**Tórshavn:** Næmingar í 2 P, sum lesa til pegagok á Føroya Lærara skúla, hava seinastu tíðina roynt seg í drama. Ein danskur leikstjóri, Dan Olsen hevur leikstjórnað og tey hava roynt seg innan Comedia Delemondo, ið er merkt av fleiri rørslum, kroppsíðkanum í staðin fyri orð.

Tey hava sýnt ævintýrið hjá H.C. Andersen »Den grimme ælling« fram á Verkstaðnum Vón og á »Virkni«. Eisini verður ein almenn sýning á Læraraskúlanum. Umframt »Den Grimme ælling« er eisini føroyska ævintýrið »Teir sjey svanarnir« á skránni.

# Laksatíðin longd

Jústinus Leivsson Eidesgaard

**Leynar:** Teir standa tigandi við tráðu í hond og bíða og bítir á einaferð, so er árið, ella árini bjargað. Tað skuldi alt verið liðugt nú 1. oktober, men turkurin í summar og tað at Føroya Sílaveiðufelag hevur brúk fyri nøkrum eyka oyrum til arbeiðið at seta smolt út, hevur elvt til at dreymurin er longdur við heilum fjúrtan døgum.

– Vit hava avgjørt at leingja tíðina, har loyvt er at veiða laks í Leynum og við Leynavatn fram til 14 oktober. Turkurin í summar elvdi til, at ringt var hjá laksinum at koma niðan. Eisini hevur okkara arbeiði, at seta smolt út, ment stovnin munandi, so væl er til av laksi í ár, sigur Jóhan Svensson, Føroya sílaveiðufelag.

Fiskikort fáast á bensinstøðini í Kollafjarðardali.

# Bók nummar 4000 nærkast



Jústinus Leivsson Eidesgaard

Nógv vatn er runnið síðan fyrsta føroyska bókin varð prentað og júst farna øldin var rættuliga gulløldin, hvat føroyskum bókum viðvíkur. Meðan okkara grannalond eiga hundraðtúsund tals bókaútgávur fleiri hundrað ár aftur í tíðina, so eru Føroyar ungar innan bókaútgávu. Bók nummar 4000 prentað á føroyskum máli kemur út í november.

Seinasta fríggjadag skipaði Rithøvundafelag Føroya og Føroys Landsbókasavn fyri bókatingið á Landsbókasavninum. Viðgjørt var hvussu støðan er hjá bókini um túsundáraskiftið, og hvørji útlitini eru hjá okkum og aðrastaðni, nú nýggja tøknin stendur til at skapa heilt aðrar fyritreytir enn tær sum hava verið, síðan Gutenberg prentaði fyrstu bókina í 1445.

Fleiri fyrilestrar vóru hildnir á bókatinginum og vit fara at gera meira burtur úr teimum, verða stundir til tess seinni. Teir, sum hildu fyrilestrarnar vóru Tórbjørn Jacobsen, landstýrismaður, sum tosaði um bókina og føroyska samleikan. Gunnar Hoydal, rithøvundur tosaði um at skriva føroyskar bókmentir. Martin Næs, landsbókavørur um bókatøl og bókasøvn. Marianna Debes Dahl um týðingar og týðarar. Ivan Niclasen um fjølmiðlar og bókmentir. Niels Chr. Nolsøe um tekst og tøkni og Kári Árting um marknaðarføring



# Fýra milliónir til at skifta tøkni

*Útvarpið og Sjónvarpið fáa nú pengar til at skifta gomlu útgerðina út við nýggja digitala tøkni*

Eyðun Klakstein

Stórur partur av útgerðini hjá Útvarpinum og Sjónvarpinum eru í so ringum standi, at hon er um at ganga fyri. Tí skulu ÚF og SvF hava pengar til keypa nýggja útgerð fyri.

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2001 skjýtur landsstýrið upp, at fýra milliónir krónur verða avsettar til at keypa nýggja útgerð fyri. Útvarpið skal hava eina millión og Sjónvarpið tríggjar. Ætlanin er at hendan játtan skal halda fram næstu árini.

– Sum nú er, nýta ÚF og SvF analoga tekniska útgerð. Henda analoga tøknin er dýr at viðlíkahalda, og tað gerst alsamt truplari at fáa hendur á eykalutum, verður sagt í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið

Víst verður á, at um allan heim leggja sjónvarps- og útvarpstøðir um til nýggjar digitalar framleiðslu- og sendihættir, og stórar íløgur verða gjørdar í útbúnað, sum byggir á teldutøkni.

### Neyðugt við nógvum pengum

Landsstýrið heldur, at nýggja digitala tøknin fer at lætta um á nógvum økjum.

Landsstýrið hugsar millum annað um sambandið millum meginøkið og útjaðaran, og møguleikarnar fyri tættari samstarvi millum stovnarnar, eitt nú millum Sjónvarp Føroya og skúlaverkið, felagsskapir og einstaklingar.

Nýggja tøknin skapar sum heild eisini nýggjar møguleikar hjá stovnunum, verður sagt í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið.

SvF og ÚF hava gjørt heildarætlanir fyri sjálvt umskiftið til digitalu tøknina. Neyðugt verður at fremja munandi íløgur á hesum øki tey næstu árini.

# Meira pengar til orðabøkur

Komandi ár skal ein millión meira brúkast av almennum pengum til at gera orðabøkur.

Í fjør var játtanin 400.000 krónur, men sambært fíggjarlógaruppskotinum skal hon næsta ár verða 1,4 milliónir.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður sagt, at hækkingin verður gjørd sambært løgtingssamtykt til økt virksemi á økinum. Fleiri nýggjar orðabøkur eru í gerð, og tørvurin á fígging til hetta virksemi er sera stórur.

Játtanin fer til at stuðla orðabókagerð, so at føroyingar skulu hava orðabøkur tøkar úr og í fremmant mál. Arbeitt verður við at samskipa verandi orðabókavirksemi.

**ek**

# Byggja nýggj skúlahøli

Studentaskúlin í Suðuroy hevur sera átrokandi tørv á nýggjum og betri undirvísingarhølum.

Tí skjýtur landsstýrið upp, at skúlin fær eina løgujáttan upp á 800.000 krónur á fíggjarlógini næsta ár. Landsstýrið ætlar at seta fýra milliónir afturat av í 2002 til sama endamál.

Játtanin er ætlað til projektering og bygging.

**ek**

# Fer hósdagin

Í gjár skrivaðu vit, at Norrøna fer úr Hanstholm leygardagin, og fer avstað aftur úr Føroyum mánadagin.

Tað er ikki rætt, tí hon fer ikki aftur fyrrenn hóskvøldið. Ferðaætlanin er nevniliga løgd soleiðis, at líka vikur fer hon at sigla tvær ferðir og ólíka vikur fer hon at sigla einaferð.